# ara heimur



*– Tað er altíð gott at koma aftur á slóðina. Higani havi eg mong góð minni, sigur Ása Rasmussen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Innrás av fólki

Tá Ása og fylgi hennara kom til Slættanes hetta vakra mánakvøldið í mai mánaði, var tað fyrsta tey gjørdu at kynda og fáa hita í húsið. Streymveiting er jú ikki í bygdini.

Tað tók sína tíð at fáa húsið heitt, tí so long tíð er gingin, síðani nakar var her seinast.

– Tá vit so høvdu fingið okkum ein drekkamunn fóru vit út at ganga okkum ein túr niðan eftir vegnum.

– Eg veit ikki, tíðin gongur altíð so skjótt tá ein ferðast soleiðis úti í náttúruni, sigur hon.

Tá tey vaknaðu morgunin eftir gekk ein maður í bygdini. So stillisliga gongur alt fyri seg her, at tey høvdu ikki minst varhugan av, at hann var komin til gongu av Vatnsoyrum.

Seint seinnapartin kom kortini broyting í, tí tað gjørdist nærum ein innrás av fólki – sløkkiliðsmonnum, tíðindafólki, borgarstjórum og tyrluni hjá Atlantsflogi, sum øll vóru við í eini stórari bjargingarroynd.

Men tá komið var út á kvøldið fór alt fólkið av bygdini.

Aftur lá hon manntóm, inntil næstu ferðafólkini koma higar!

*Eg minnist einaferð, at ein drongur var farin til oyralækna í Vestmanna. Tað tosaðu vit nógv um*

*Vit hava ikki anilsi av, hvat er hent í verðini, síðani vit komu higar í gjárkvøldið*

## Svimjihyl og ferðasamband

Nógv hevur verið gjørt fyri at leggja lunnar undir eina menning av Slættanesi. Í 1934 varð millum annað uppskot lagt fyri tingið, um at fáa studning til gerð av svimjihyli her. Men gott ferðasamband mundi kortini vera tað, sum lá fólki fremst í huga.

Á heysti í 1942 vendi lærarin í bygdini, Napoleon Petersen sær aftur til løgtingið við áheitan um at fáa sjóvegis postsamband. Hann vísti millum annað á, at bygdin lá langt frá øðrum bygdum í oynni, og bert hálvan tíma úr Vestmanna.

Hansara uppskot var, at motorbáturin »Ólavur« kundi røkta henda postflutningin. Hann røkti frammanundan rutuna millum Vestmanna og Fútaklett og Kvívík, og kundi tí gott tikið Slættanes við. Smiril, sum sigldi frá Sørvági til Vestmanna kundi eisini lagt at á Slættanesi, um hann hevði góðs við ella visti av góðsi.

Undirtøka fekst kortini ikki fyri hesum uppskotum, uttan so at sagt varð, at Smyril kundi steðga fyri Slættanes-bygd um skiparin helt at líkindi vóru til tess.



*Longu í 1941 og 1942 varð roynt at fáa regluligan postflutning til Slættanesar. Ein maidag í 2007 legi postbáturin Ólavur við bryggju í bygdini – júst sum í gomlum døgum. – Teir duga so væl at manerera, sigur Ása Rasmussen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*